Fylgiskjal 2.

**Nella Festirstein**

| | |
|---|---|
| **Fra:** | Birita Ludvíksdóttir |
| **Sendt:** | 29. april 2019 11:23 |
| **Til:** | Nella Festirstein |
| **Cc:** | Turid Arge; Jan Simonsen |
| **Emne:** | VS: TIL UMMÆLIS: Ríkislógarmæli um at seta Politilógina í gildi fyri Føroyar. Freist 27. mai. |

Góða Nella,

Heilsu- og Innlendsmálaráðið hevur móttikið til ummælis ríkislógartilmæli um at seta Politilógina í gildi fyri Føroyar.

Heilsu- og Innlendismálaráðið hevur eftirkannað, um ríkislógartilmælið hevur serligar avleiðingar fyri málsøkið hjá landsstýriskvinnuni í heilsu- og innlendismálum. Í kap. 3 um "svage og udsatte personer" eru ásetingar um, at tørvar persóni (serliga børnum) læknahjálp, skal persónurin kannast av lækna og í kap. 4 um "særlige bestemmelser om visse magtmidler", eru ásetingar í §§ 17-20 um, at lækni skal gera kanningar av persónum eftir at løgreglan hevur nýtt vald. Heilsu- og Innlendismálaráðið hevur ikki viðmerkingar til hesar ásetingar og metir annars ikki, at ríkislógartilmælið hevur serligar avleiðingar fyri heilsu- og innlendisøkið.

Vinaliga/Sincerely

Birita Ludvíksdóttir
Løgfrøðiligur ráðgevi/Legal adviser

Heilsu- og Innlendismálaráðið/
Ministry of Health and the Interior
Eirargarður 2 • 100 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. +298 304050 • Mobile +298 734066
birita.ludviksdottir@himr.fo • www.himr.fo

**Fra:** Nella Festirstein
**Sendt:** 12. april 2019 16:33
**Til:** hem@sorinskrivarin.fo; JKO017@politi.dk; Elkin.Klettheyggj@kriminalforsorgen.dk; **Mentamálaráðið** <mmr@mmr.fo>; **Almannamálaráðið** <amr@amr.fo>; **Heilsu- og innlendismálaráðið** <himr@himr.fo>; kf@kf.fo; petersen@adv.fo; aaa001@politi.dk; megd@megd.fo; amnesty@amnesty.fo; **Fíggjarmálaráðið** <fmr@fmr.fo>; **VMR-Journal** <uvmr-journal@uvmr.fo>; **Fiskimálaráðið Journal** <fisk@fisk.fo>; **Samferðslumálaráðið** <smr@smr.fo>; **'dat@dat.fo'** <dat@dat.fo>; **'industry@industry.fo'** <industry@industry.fo>; **Kundatænastan á TAKS** <taks@taks.fo>
**Emne:** TIL UMMÆLIS: Ríkislógarmæli um at seta Politilógina í gildi fyri Føroyar. Freist 27. mai.

Hjáheft verður sent tykkum til ummælis uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar *Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om politiets virksomhed.*

**Freistin at senda ummæli er mánadagin 27. mai.**

Ummæli skal sendast til nellaf@tinganes.fo

Við hesum lógaruppskotinum verður sett í verk ein grundleggjandi og samla lóggáva fyri vanliga virksemið hjá politinum. Lógin ásetir eisini tær grundleggjandi meginreglurnar fyri valdsnýtsluni hjá politinum sum liður í vanligum skilhaldi. Við Politilógini verða greiða reglur á hesum øki. Hetta styrkir um rættartrygdina hjá borgarunum, samstundis sum at politið fær eitt greitt grundarlag at arbeiða út frá í støðum, har politið fyri at kunna røkja sínar uppgávur, má fremja inntriv mótvegis borgárum, møguliga við at brúka tvingsil.